## Danskur hermaður doyði í Afganistan

Ein danskur hermaður doyði í Afganistan týsmorgun. Talan er um tann 34 ára gamla majorin, Anders Johan Stæhr Storrud. Deildin hjá Anders Johan Stæhr Storrud bleiv mánadagin álopin við mortarum og rakett-riknum granatum. Danski hermaðurin bleiv førdur við tyrlu til eitt hernaðarsjúkrahús, har hann fekk intensiva viðgerð. Men í morgun andaðist hann. Anders Johan Stæhr Storrud hevði eisini gjørt hertænastu í Irak.




## Samskip og IR Lastvognar farin í Samstarv

Í gjár skrivaðu Samskip og IR Lastvognar undir nýggjan sáttmála um ymsar tænastur, sum eitt nú koyring av bingjum/heillastum og kranakoyring v. m. Heini á Borg, goymsluleiðari hjá Samskipum sigur, at partarnir eru væl nøgdir við sáttmálan, sum hevur økt munandi um virksemi hjá báðum pørtum. Á myndini síggjast Heini á Borg frá Samskipum og Rasmus Rasmussen frá IR Lastvognum.



Tað er alneyðugt við einari handlingsætlan, skulu vit gera okkum vónir um at halda Kyoto-sáttmálan, og hana hava vit ikki, sigur Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum

# Vit mugu hava eina ætlan

**Tað er ikki nóg mikið at avtaka føroyska fyrivarni móti Kyoto-avtaluni. Vit mugu hava greiðar ætlanir um, hvussu vit náa málinum í avtaluni, og tað hava vit ikki, sigur Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins**

KYOTO-AVTALA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Løgtingið hevur samtykt at taka undir við Kyoto-avtaluni – ella rættari at taka føroyska fyrivarni av í donsku avtaluni.

Men tað er bara ein lítil partur av málinum. Stóri spurningurin er, hvussu vit megna at yvirhalda hesa avtaluna.

- Løgmaður segði í løgmansrøðu síni, at hann skuldi lata eina frágreiðing gera um, hvussu vit náddu málinum, sum ES og harvið Danmark hava sett sær. Men enn er eingin frágreiðing komin, og í mínari verð er hetta mál alt ov illa fyrireikað. Faktisk er tað slett ikki fyrireikað yvirhøvur, sigur Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum.

Hann eftirlýsir tískil einari handlingsætlan fyri, hvussu Føroyar kunnu uppfylla krøvini í hesari ætlan.

- Øll heimsins lond hava samrátt seg fram til eina individuella avtalu um hendan sáttmálan, og eingi lond hava bundið seg til sama útlát. ES hevur samlað bundið seg til at minka útlátið við 8%, men eisini innan ES eru tølini ógvuliga ójøvn frá landi til land, sigur Jørgen Niclasen.

Danmark hevur bundið seg til at minka útlátið við 8%, men teir hava fingið tað frávik inn í sáttmálan, at handilsflotin verður hildin uttanfyri samlaða útlátið. Luxemburg skal minka sítt útlát við heilum 28%, meðan Portugal og Írland kunnu økja útlátið ávikavist 28% og 23%.

Onnur lond uttan fyri ES hava gjørt sínar egnu avtalur um Kyoto. Til dømis hevur Ís-land tilskilað sær rætt til at økja útlátið 10% og fyri Noreg er talið + 1%.

### Samráðast við danir

Kyoto-avtalan byggir á upprunaligu avtaluna, sonevndu Rio-avtaluna frá 1992. Føroysku tølini bygdu á hagtøl fyri 1990, og í dag hava vit bert hagtøl fram til 2004. Hesi tøl vísa, at skulu vit hal-da Kyoto-sáttmálan við upprunaligu minkingini, so svarar hetta til 19,6% í mun til tølini frá 2004.

- Eingin veit, hvussu tølini eru í dag, men tað er einki at ivast í, at skulu vit ganga undir Kyoto-sáttmálan, so skal tað gerast við samráðingum, sum taka hædd fyri okkara viðurskiftum. Soleiðis hava øll onnur heimsins lond gjørt, tá tey hava góðkent Kyoto, og tí er tað púra náttúrligt, at vit eisini gera tað, sigur Jørgen Niclasen.

Hann vísir á, at tá vit ikki eru sjálvstøðug tjóð, hava vit ongan annan at samráðast við enn danir. Tað verður so upp til danir at avgreiða okkara »handlingsætlan« víðari.

- Men hvat hendir, um vit ikki megna at halda ásetingarnar í avtaluni? Skulu vit so út at keypa okkum eyka kvotu, ella skulu danir gera tað og síðani senda okkum rokningina? Og hvat um vit minka útlátið meiri en avtalað, kunnu vit tá fara út at selja kvotur, ella skulu danir gera tað fyri okkum? Ella ber tað als ikki til hjá okkum at selja kvotur?, spyr Jørgen Niclasen.

Formaður Fólkafloksins sigur, at alt hetta eru viðurskifti, sum vit mugu fáa greiði á.

Tað einasta vit hava at vísa á, er orkupolitikkurin fram til ár 2015.

### Hvat um vit finna olju

Føroyingar hava í eina tíð havt eitt ávíst samskifti við íslendingar um at leggja ein orkukaðal millum londini bæði soleiðis, at orka kann flytast úr Íslandi til Føroya.

- Hetta er avgjørt ein møguleiki, sum stendur opin. Men spurningurin er, hvat hendir, um hetta verður veruleiki, tí tá verður framleiðslan flutt úr Føroyum til Íslands, og harvið eisini alt $CO_2$ útlát. Kemur hetta tá okkum tilgóða, ella skal tað góðskrivast donsku kontoini, spyr Jørgen Niclasen.

Eitt annað, sum eingin heldur tykist hava hugsað um, er hvat hendir, um olja verður funnin á føroyska landgrunninum.

- Tað er ein sannroynd, at bara ein einasti boripallur hevur líka stórt útlát sum alt tað samlaða føroyska útátið í dag. Hvussu verður tá við minkingini av útlát-in-um, spyr Jørgen Niclasen víðari.

Samanum tikið heldur formaður Fólkafloksins, at málið er alt ov lítið fyrireikað, og at alt ov nógvir leysir træðrir eru, sum vit fyrst mugu noyðast at finna út av, áðrenn vit kunnu byrja at tosa um, at definera treytirnar í Kyoto, tiansheldur uppfylla tær.